


# Dreymar við havið

Ester býr í lítlu bygdini við havið og droymir um at sleppa burtur. Tá Ragna flytur til bygdina, broytist alt, og í henni sær Ester, at nakrir dreymar kunnu gerast veruleiki. Dreymar við havið er ein inniligur ungdómsfilmur um vinalag og leitanina eftir egnum samleika.

/ Lærugrein og stig: Føroyskt á A-stigi. Við smáum tillagingum kann tilfarið eisini brúkast á C-stigi og í hádeild fólkaskúlans.

→ mitcfu.dk/TV0000127135

Copydan/ AVU-medier

cfu centre for undervisningsmidler

NÁM

**Faklig øki**
Við hesum tilfarinum kunnu næmingarnir menna førleikarnar at greina og tulka film og at seta í frásjón. Somuleiðis menna tey førleikarnar at skriva og at skapa marghháttaðan tekst.

**Tilfar**
Arbeitt verður við filminum Dreymar við havið (117 min.). Harafturat eru leinki til ymiskt annað bakstøðistilfar:

/ "Filmur í Føroyum", snar.fo.

/ Eilen Anthoniussen: "Føroyar eru meira enn tað, vit síggja út ígjøgnum køksvindeygað", Atlantic Review, várið 2017.

/ "Filmur", Sýni & Dýpi 1, 2014

/ Sakaris Stórá: Summarnátt, 2012

/ Sakaris Stórá: Vetrarmorgun, 2013

**Arbeiðshættir**
Floksundirvísing, bólkaarbeiði og einsæris arbeiði.

**Tíð**
5 blokkar á 90 min.







# Arbeiðsuppgávur

## 1. blokkur

**Fyrireiking heima:**
Lesið tekstirnar “Filmur í Føroyum” og “Føroyar eru meira enn tað, vit síggja út ígjøgnum køksvindeygað” og hyggið at filminum *Dreymar við havið*.

**Floksundirvísing (fyrra helvt av blokkinum):**
Bygnaðurin í filminum:
/ Setið filmin í frásagnarfrymilin. Greiðið heilt stutt frá innihaldinum í filminum fyri hvørt stigið í frásagnarfrymlinum.
/ Setið filmin í aktantfrymilin og lýsið heilt stutt ymsu aktørarnar í filminum.
/ Setið filmin í frymilin heima-úti-heim og lýsið heilt stutt tey trý stigini í filminum.

Orðaskifti í bólkum (seinna helvt av blokkinum):
/ Greiðið hvør sær frá onkrum í filminum, sum ávirkaði tykkum mest, ella sum tit serliga løgdu til merkis.
/ Skiftið síðan orð um evni/tema og boðskap í filminum.

Skrivið hvør sær stikkorð og viðmerkingar niður frá orðaskiftinum í bólkinum. Hetta skal møguliga brúkast aftur seinni, tá tit skulu gera framløgutekst.

## 2. blokkur

**Fyrireiking heima:**
Lesið partin “Filmur” í Sýni & Dýpi 1 og hyggið umaftur at filminum Dreymar við havið við tykkara bólkauppgávu í huga.

Við støði í lisna tilfarinum í Sýni & Dýpi 1 skulu tit í bólkum greina eitt brot úr filminum í smálutir:
/ Greiðið frá innihaldinum í brotinum.
/ Greinið brotið og vísið á dømi. Tit skulu m.a. greina skaldslig eyðkenni, filming, klipping, ljóð og sjónarhorn.
/ Er nakað í brotinum, sum vísir til onnur brot í filminum? T.d. ein lutur ella okkurt, sum verður sagt ella gjørt?
/ Hvønn týdning hevur júst hetta brotið fyri søgugongdina?

**Uppskot til brot:**
Brot 1 / 00:00:00 – 00:03:44 (sunnudagsskúlin)
Brot 2 / 00:23:15 – 00:28:16 (fyrsti snapsurin)
Brot 3 / 00:30:55 – 00:34:48 (boðin til súpan)
Brot 4 / 00:42:07 – 00:47:56 (biltúrurin)
Brot 5 / 00:56:39 – 01:00:03 (móðir og dóttir)
Brot 6 / 01:05:41 – 01:09:46 (tað góða heimið)

## 3. blokkur

Við støði í bakstøðistilfarinum og bólkaarbeiðinum skulu tit gera ein talgildan framløgutekst. Teksturin kann t.d. vera eitt videobrot ella ein myndarøð saman við stuttari munnligari framløgu.
Framløguteksturin skal í minsta lagi fevna um:

/ Kunning um filmin.
/ Ítøkilig greiningardømi við frágreiðingum.
/ Niðurstøður frá bólkaarbeiðinum við grundgevingum.

## 4. blokkur

Framløgurnar verða vístar/hildnar í flokkinum, og tikið verður samanum.

## 5. blokkur

**Fyrireiking heima:**
Hyggið eftir filmunum Summarnátt (2012) og Vetrarmorgun (2013) eftir Sakaris Stórá og gerið av, um tit vilja arbeiða við uppgávu 1 ella uppgávu 2 niðanfyri.

Skrivið hvør sær eina próvtøkulíknandi skrivliga uppgávu. Vel millum uppgávu 1 og uppgávu 2.

**Uppgáva 1**

/ Greina og tulka stuttfilmin Summarnátt (2012) eftir Sakaris Stórá. Legg dent á persónslýsing og huglag.
/ Ber Summarnátt saman við Vetrarmorgun (2013) og Dreymar við havið (2017)
/ Set hesar tríggjar filmarnar í føroyskan filmssøguligan samanhang.

**Uppgáva 2**

/ Greina og tulka stuttfilmin Vetrarmorgun (2013) eftir Sakaris Stórá. Legg dent á persónslýsing og huglag.
/ Ber Vetrarmorgun saman við Summarnátt (2012) og Dreymar við havið (2017)
/ Set hesar tríggjar filmarnar í føroyskan filmssøguligan samanhang.

Býtið flokkin sundur í hóskandi bólkar eftir valinum millum uppgávu 1 og uppgávu 2. Brúkið fyrru helvt av blokkinum til at skifta orð um filmarnar, gera viðmerkingar til uppgávuorðingina og gera hugakort.

Seinna helvt av blokkinum er skriviverkstaður, har tit hvør sær byrja upp á skrivligu uppgávuna. Tit gera uppgávuna lidna heima og lata síðan inn.